5 707265 100029 >

# 8 spurningar um jól



## Richard Mortensen

***Hvat er tað besta við jólum?***
At verða saman við familjuni og slappa av - alt er stongt, so friðurin fær loyvi at leggja seg. Eisini er tað øgiliga festligt við gávum og pynti.

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***
At tey eru so skjótt liðug - og at tey eru í einum vanligum vikuskifti.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Vit vóru fleiri familjur sum hildu jól hjá omma og abba mínum á Argjum - so har vóru heilt nógva fólk savnaði hvørt ár.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Heima saman við familjuni - byrja við at fara í kirkju jólaaftan og so gásasteik og tað sum annars hoyrir traditiónini til.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Eg haldi at tað er í lagið - tí so gloyma vit hvussu myrk og keðilig henda tíðin á árinum er.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Ja, mangan - eisini í London sum var nakað øðrvísi enn her heima.

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
Ja, og av tí at eg hugsi meg rímiliga væl um - so tekur tað langa tíð.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Bøkur: antin nýggju bólkin um Kierkegaard við Ólavi Rasmussen ella Ó hjá Carl Johan Jensen. So eg vóni at tær liva um til ummælini...

























